tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 27.03.2026 kl. 17:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Barbara Michalina Tausen, Bjarni Hammer, Eyð Jóna Eidesgaard, Arnfinn Bech

Varalimir:

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 21/26 | 26/00101-1 | Yvirtøka av sjóvarmálanum - Tvøroyrar kommuna |
| 22/26 | 26/00093-4 | Útskifting av ketli til hitapumpu - Seglloftið og Pakkhús 4 |
| 23/26 | 26/00102-1 | Útiøkið kring Thomsens bygningar á Havnalagnum - gongubreytir, trappur, gelendarar o.a. |
| 24/26 | 25/00218-2 | Apotekið -fyrisp. um hølir |
| 25/26 | 26/00076-1 | Sjógøta 2 -innrætting og tillagingar av 1. hædd, til fyrisitingina hjá Tvøroyrar kommunu |
| 26/26 | 26/00059-1 | Tvøroyrar Havn - Burturkast frá skipum |
| 27/26 | 26/00070-1 | Tvøroyrar havn - Dagføring av el-prísum hjá Tvøroyrar havn |
| 28/26 | 25/00219-2 | Víkingarlanghús og goymsla til SALT |
| 29/26 | 25/00445-1 | Cruise-ferðavinna - ferðamannaskip |
| 30/26 | 25/00509-1 | Kunningarstovan -Gaml. Kgl. Handlinum "Krambúðin" |
| 31/26 | 25/00159-5 | Integratiónssamskipari |
| 32/26 | 26/00144-2 | RFF -Ráðið fyri Ferðslutrygd ársfundur 2026 |
| 33/26 | 26/00109-2 | FSR -Umsokn um fíggjarligan stuðul róðrarárið 2026 |

| Til kunningar | | |
|---|---|---|
| 3/26 | 26/00001-1 | Kunning um skattainntøkur 2026 |
| 4/26 | 24/00159-1 | Oyggjaleikir 2027 - bjóða Tvøroyri fram til at hýsa ítróttargreinum |
| | | |

Kristin Michelsen, borgarstjóri lesur skránna til fundin í dag og kunnar um at tvey mál eru komin afturat skránni, eftir at skráin bleiv kunngjørd alment:

31/26 Integratiónssamskipari
32/26 RFF -Ráðið fyri ferðslutrygd ársaðalfundur 2026

Kristin Michelsen, borgarstjóri spyr um viðmerkingar eru til skránna.

Barbara Tausen mælir til at málið: "33/26 FSR -Umsókn um fíggjarligan stuðul róðraráðið 2026" kemur á skrá -Arnfinn Bech, mælir frá at málið verður á skrá.

**Til støðutakan**

## 21/26
## 26/00101-1 Yvirtøka av sjóvarmálanum - Tvøroyrar kommuna

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 09.03.2026 | 17/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.03.2026 | 39/26 |
| 3 Býráðið | 27.03.2026 | 21/26 |

**Fíggjarnevndin 10. marts 2026:**
Borgarstjórin mælir til at heimila umsitingini at fara í samráðingar við teir hagapartar, sum varða av matr.nr. 780, Froðba, sum grensar upp til Húsgarðsá fyri eystan, og allar teir matriklar, sum eru framvið fjøruni vestur til og við matr.nr. 146, Trongisvág, sum endar vesturi við Svalbardsá. -Einmælt samtykt

**Býráðið 27. mars 2026:**
Borgarstjórin mælir til at heimila umsitingini at arbeiða víðari við hesum málinum, og gera tilmælið til ein seinni býráðsfund.
Fyri eru: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Eyð Eidesgaard, Bjarni Hammer og Barbara Tausen
Ímóti er: Arnfinn Bech
Arnfinn ynskir at kommunan eigur at raðfesta aðrar íløgur fram um hesa.

**Býráðið 27. mars 2026:**
Borgarstjórin mælir til at heimila umsitingini at arbeiða víðari við hesum málinum, og gera tilmælið til ein seinni býráðsfund.
Fyri eru: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Eyð Eidesgaard, Bjarni Hammer og Barbara Tausen
Ímóti er: Arnfinn Bech
Arnfinn ynskir at kommunan eigur at raðfesta aðrar íløgur fram um hesa.

**22/26**
**26/00093-4 Útskifting av ketli til hitapumpu - Seglloftið og Pakkhús 4**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 09.03.2026 | 12/26 |
| 2 Býráðið | 27.03.2026 | 22/26 |

**Málslýsing: Tekniski leiðarin (GM) tann 27.02.2026**
Hitaskipanin við oljuketli á Seglloftinum er samanbundin við Pakkhús 4, og av tí at bygningarnir eru illa bjálvaðir, er tað sera dýrt hjá Tvøroyrar kommunu at halda bygningarnar heitar.
Kommunan er farin undir eina tilgongd við at gera orkusparandi tiltøk fyri at tálma útreiðslurnar av bygningum hjá kommununi.
Kommunan hevur tí sett seg í samband við 2 veitarar, "Veitari-1" og "Veitari-2", um at geva tilboð uppá at skifta gomlu hitaskipanina á Seglloftinum út.
Tilboðini eru gjørd út frá somu fortreytum, og er støddin á hitapumpunum sett eftir oljuforbrúkinum seinastu árini.

Veitari-2 hevur í tilboðnum lagt hesar útrokningarnar við yvir forbrúki hjá Seglloftinum/Pakkhús 4:

- Forbrúk: 12.000 l/ár
- Árligt hitabrúk í kr.: 96.000 kr/ár (oljuprísur 8 kr/l)
- Meting á nýggjum orkukostna: 42.585 kr/ár

Av tí, at báðar loysnirnar minna nógv um hvørja aðra, kann væntast, at tølini fyri komandi orkunýtslu eru áleið tað sama fyri loysnina hjá Veitara-1 og Veitara-2.

**Tilboð 1:** Veitari-1

**2 stk Hitapumpur** [redacted] íroknað stýringar, heittvatnstanga og buffertanga, umframt pumpur til sirkulatión av heittvatni og til hita.
Íroknað er alt HVS- og el-arbeiði í samband við uppseting, holboringar, rørføringar, montering og uppstart.

Samlaður tilboðskostnaður: 259.600,00 + mvg
Grønur elmálari: 18.740,00 + mvg

**Tilboð 2:** Veitari-2

**Propan 2stk. 19kW. COP 5,0**
[redacted]
Við framrensluhita á upp til 70°C, eru [redacted] hitapumpurnar mentar serliga til nútímansgerð, har núverandi radiatorar verða nýttir, soleiðis at orkan verður gagnnýtt á besta hátt.

Samlaður tilboðskostnaður: 270.000,00 + mvg
Grønur elmálari: 18.000,00 + mvg

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Avsettar eru 500.000 kr á FÆ2026 til endamálið, §609 Bygningar løguframleiðsla "Thomsen bygningar, hitapumpur"

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Teknisku nevnd og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Tekniska nevnd 09. marts 2026:**
Nevndin mælir til at taka av tilboðnum frá Veitara-1 og beinir málið víðari í Fíggjarnevndina. Einmælt samtykt.

**Býráðið 27. mars 2026:**
Einmælt samtykt at taka av tilmælinum hjá Teknisku nevnd at taka av tilboðnum frá veitara 1.

**23/26**
**26/00102-1 Útiøkið kring Thomsens bygningar á Havnalagnum - gongubreytir, trappur, gelendarar o.a.**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 09.03.2026 | 9/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.03.2026 | 40/26 |
| 3 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 12.03.2026 | 12/26 |
| 4 Býráðið | 27.03.2026 | 23/26 |

**Málslýsing: Tekniski leiðarin (GM) tann 06.03.2026:**
Formaðurin í V&H ynskir at fáa skipað útiøkið frammanfyri teir gomlu bygningarnar hjá T.F.Thomsen á Havnarlagnum. Arbeiði er í løtuni í gongd við at gera útiøkið kring Pakkhús 18 klárt, og í tí sambandinum er upplagt, at kommunan eisini fer í gongd við at gera økið sunnafyri Pakkhús 4, Pakkhús 5 og Pubbina trygt hjá ferðandi til gongu.

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Vinnu- og havnanevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Vinnu- og havnanevndin 09. marts 2026:**
Nevndin mælir til, at gongubreyt verður gjørd frá eystara enda av Pakkhúsi 4 vestur til gongubreytina í keibrekkuni. Nevndin mælir eisini til, at gongubreytin frá eystara enda á Pakkhús 4 til vestara enda á Pakkhúsi 5 verður sundurskild frá økinum sunnanfyri báðar bygningarnar við einum gelendara, og at økið norðanfyri gelendaran verður niðurfelt í mun til gongubreytina. Fundamentið til gomlu mastrina sunnanfyri Pakkhús 4 skal takast vekk. Einmælt samtykt.
Atkomuviðurskiftini millum og til Seglloftið, Gl. Kgl. Handilin og Pakkhús 5 skulu gerast betri. Einmælt samtykt.

**Fíggjarnevndin 10. marts 2026:**
Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá vinnu- og havnanevndini um at gera gongubreyt frá eystara enda av Pakkhúsi 4 vestur til gongubreytina í keibrekkuni, at sundurskilja økið við gelendara millum Pakkhús 4 og 5 og at niðurfella økið norðanfyri gelendaran í mun til gongubreytina. Somuleiðis verður tikið undir við at taka fundamentið til gomlu mastrina sunnanfyri Pakkhús 4 burtur og at betra um

atkomuviðurskiftini millum og til Seglloftið, Gl. Kgl. Handilin og Pakkhús 5. Umsitingin verður heimilað at samráðast við relevantar partar og arbeiða víðari við at fremja málið. -Einmælt samtykt.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 12. marts 2026:**
Trivnar- og umhvørvisnevndin tekur einmælt undir við ætlanini, og mælir til at tað yvirornað verður hugsa um at fáa uppset meira ljós, sum passa til økið, um kringøkið við gomlu pakkhúsini.

**Býráðið 27. mars 2026:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Vinnu- & havnanevndini, Fíggjarnevndini og Trivnar og umhvørvisnevndini.

**24/26**
**25/00218-2 Apotekið -fyrisp. um hølir**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 02.06.2025 | 43/25 |
| 2 Sosiala nevnd | 18.06.2025 | 29/25 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.06.2025 | 69/25 |
| 4 Býráðið | 26.06.2025 | 50/25 |
| 5 Fíggjarnevndin | 10.03.2026 | 45/26 |
| 6 Býráðið | 27.03.2026 | 24/26 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 28.05.2025**
Umsitingin hevur móttikið fyrisp. frá landsapotekaranum, um Tvøroyrar kommuna hevur hølir, sum Apotekið kann leiga í eitt tíðarskeið, meðan umvælingar verða gjørdar á verandi Apoteksbygning undir Heygnum 4.

Landsapotekarin upplýsir, at trupulleikar eru við soppavøkstri á apotekinum undir Heygnum 4. Landsverk er innyvir, og Heilsumálaráðið er kunnað. Á fundi við HMR, bleiv avgjørt, at landsapotekarin skal spyrja kommununa um hon kann hjálpa apoteksverkinum.
Brúk er fyri umleið 400 – 500 fermetrum til handil og kontór/matstovu og goymslurúm.

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið teknisku nevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 02. juni 2025:**
Kristin Michelsen borgarstjóri kunnar um, at umsitingin hevur havt fund við umboð við Apoteksverkið í dag 2. juni, um tørvin hjá apotekinum at leiga hølir. Kunna bleiv um, at Apoteksverkið var vitandi um, at kommunan eigur bygningin á Sjógøtu 2. og at áhugi er fyri at leiga henda bygningin. Borgarstjórin mælir til, at umsitingin fær heimild til at samráðast við Apoteksverkið um møguligar loysnir. -Einmælt samtykt.

**Kommunustjórin 12. juni 2025**
Umsitingin hevur tann 3. juni 2025 sent eitt skriv til Heilsumálaráðið, adressera til landsstýriskvinnuna, har greitt verður frá ætlanini at byggja ein nýggjan heilsudepil á Tvøroyri. Í svarskrivinum frá

Heilsumálaráðnum, dagfest 12. juni, verður upplýst, at ráðið ynskir fund við kommununa fyri at umrøða ætlanina nærri.

Í sama skrivinum hevur kommunan eisini kunnað Heilsumálaráðið um støðuna hjá Apotekinum á Tvøroyri. Landsapotekarin hevur vent sær til Tvøroyrar kommunu við fyrispurningi um, hvørt kommunan hevur hølir, sum Apoteksverkið kann leiga, orsakað av álvarsamum soppavøkstri í verandi bygningi undir Heygnum 4, sum nú verður mett at vera heilsuskaðiligur at uppihalda seg í.

Apoteksverkið hevur upplýst, at tey meta at hava tørv á hølum fyribils í 1–2 ár, meðan verandi apotek verður umvælt. Eftir ein innleiðandi fund við Landsapotekaran, Landsverk og starvsfólkini á Apotekinum er stórur áhugi fyri at leiga fyrrverandi avgreiðsluhølini hjá Posta á Sjógøtu 2 – ein bygningur, sum Tvøroyrar kommuna eigur, og sum annars er ætlaður til móttøku og býarbókasavn o.a.

Kommunan er jalig fyri at hjálpa Apoteksverkinum úr teirra trupulleikum, og ynskir at leiga út fyrv. Posta avgreiðsluna á Sjógøtu 2 í eitt styttri tíðarskeið. Samstundis hevur kommunan kunna Apoteksverkið um ætlanina at byggja ein nýggjan heilsudepil á Tvøroyri, sum kommunan hevur boðið Apoteksverkinum innivist í. Apoteksverkið arbeiðir saman við Landsverk fyri at staðfesta, hvussu umfatandi umvælingarnar á bygningin undir Heygnum 4 eru, hvussu langa tíð hesar fara at taka, og hvussu stórur fíggjarligi kostnaðurin væntandi verður. Kommunan hevur í hesum sambandi mælt pørtunum til, eisini at meta um, hvørt tað kann vera skilabetri at byggja nýtt heldur enn at umvæla gamla bygningin.

Umsitingin mælir sosialu nevndini – og møguliga býráðnum umvegis fíggjarnevndina – til at taka støðu til, um hølini á Sjógøtu 2 skulu leigast út til Apoteksverkið sambært fyriliggjandi leigusáttmála, og harvið útseta samtyktina hjá Tvøroyrar býráð at staðseta móttøku, kunningarstovu og býarbókasavn í bygninginum.

Fyriliggjandi uppskot til leigusáttmála við Apoteksverkið er í fyrstu syftu galdandi í eitt ár, við møguleika at leingja hann fram til endan av 2026, tá ein nýggj og varandi loysn væntandi verður klár hjá Apoteksverkinum.

**<u>Sosiala nevnd 18. juni 2025:</u>**
Forkv. mælir til at leigi hølini á Sjógøtu 2 út til Apoteksverkið sambært fyriliggjandi leigusáttmála. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina. -einmælt samtykt.

**<u>Fíggjarnevndin 19. juni 2025:</u>**
Alvi Mortensen og Bjarni Hammer taka undir við tilmælinum hjá Sosialu nevnd at leigi hølini á Sjógøtu 2 út til Apoteksverkið sambært fyriliggjandi leigusáttmála. - Kristin Michelsen tekur støðu á býráðsfundi.

**<u>Býráðið 26. juni 2025:</u>**
Borgarstjórin kunnar um málið og greiðir frá, at Landsapotekarin hevur svara uppá spurning, hvørt Apotekið framhaldandi verður staðsett á Tvøroyri, Landsapotekarin upplýsir, at tað er ongin ætlan um at flyta Apotekið av Tvøroyri, men at tann avgerðin liggur endaligt hjá landstýrisfólkinum í heilsumálum.

Borgarstjórin mælir býráðnum til at atkvøða um tilmælið hjá Sosialu nevnd og meirilutanum í fíggjarnevndini, hvørt Tvøroyrar kommuna skal leiga hølini á Sjógøtu 2 til Apoteksverkið, samsv. fyriliggjandi leigusáttmála. -Einmælt samtykt

**Kommunustjórin 09.03.2026**

## Málslýsing -ískoyti umsókn um at leingja leigusáttmálan

Tvøroyrar kommuna hevur móttikið formliga umbøn frá Apoteksverkinum um at leingja verandi leigusáttmála fyri hølini á **Sjógøtu 2, Tvøroyri**, sum Apoteksverkið í løtuni leigar frá kommununi. Í umbønini verður víst til, at ynski er at leingja leigumálið **til og við juli 2027**, tí væntað verður, at verandi hølir hjá Apotekinum undir Heygnum verða liðugt umvæld tá, sambært upplýsingum frá Landsverki.

Verandi leigusáttmáli millum Tvøroyrar kommunu og Apoteksverkið varð gjørdur í juli 2025. Sambært sáttmálanum tekur leigumálið við 1. juli 2025 og er galdandi fram til 31. mai 2026, við møguleika at leingja tað fram til 31. desember 2026. Somuleiðis er beinleiðis ásett í sáttmálanum, at leigan ikki kann verða longur enn til 31.12.2026.

Við nýggju umbønini frá Apoteksverkinum er talan sostatt um eina leingjan út um tíðarskeiðið, sum upprunaligi leigusáttmálin heimilar. Um kommunan ynskir at ganga umbønini á møti, krevur hetta, at nýggj semja verður gjørd millum partarnar, antin við einum ískoyti til verandi sáttmála ella við nýggjum leigusáttmála, har tíðarskeiðið verður tillagað.

Umsitingin metir, at tað framvegis er sakligt grundarlag fyri at halda fram við útleiga, tá ið talan er um eina fyribils loysn, meðan Apoteksverkið bíðar eftir, at egnu hølini verða liðugt umvæld. Samstundis eigur kommunan at taka støðu til, um útleigan fram til juli 2027 er hóskandi í mun til aðrar kommunalar ætlanir við bygninginum á Sjógøtu 2.

## Tilmæli

Umsitingin mælir til, at nevnd/býráð tekur støðu til, um Tvøroyrar kommuna skal játta umbønini frá Apoteksverkinum um at leingja leigusáttmálan fyri hølini á Sjógøtu 2 **til og við 31. juli 2027**, og at umsitingin fær heimild at fyrireika ískoyti til verandi leigusáttmála ella nýggjan leigusáttmála hesum samsvarandi.

**Fíggjarnevndin 10. marts 2026:**
Borgarstjórin mælir til at leingja leigusáttmálan á Sjógøtu 2, til og við 31. juli 2027, og at og at umsitingin fær heimild at fyrireika ískoyti til verandi leigusáttmála. -Einmælt samtykt.

**Býráðið 27. mars 2026:**
Borgarstjórin mælir til at leingja leigusáttmálan til og við 31. juli 2027, og at heimila umsitingini at fyrireika ískoyti til verandi leigusáttmála. -einmælt samtykt.

**25/26**
**26/00076-1 Sjógøta 2 -innrætting og tillagingar av 1. hædd, til fyrisitingina hjá Tvøroyrar kommunu**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.02.2026 | 26/26 |
| 2 Býráðið | 27.02.2026 | 20/26 |
| 3 Tekniska nevnd | 09.03.2026 | 14/26 |
| 4 Fíggjarnevndin | 10.03.2026 | 41/26 |
| 5 Býráðið | 27.03.2026 | 25/26 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 12.02.2026**

## 1. Stutt samandráttur (endamál)

Umsitingin er farin undir eina stigvísa tillaging av bygninginum á **Sjógøtu 2 (matr.nr. 374)**, so umsitingin hjá Tvøroyrar kommunu kann flyta í **ovaru hædd** helst í inniverandi ári. Málið er at tryggja hóskandi og tíðarhóskandi skrivstovuhølir, soleiðis at **øll starvsfólk fáa egna skrivstovu**, og at neyðug felags- og serrúm verða skipað (køk, toilettir, kopirúm, fundarrúm o.o.).

## 2. Bakgrund, støðan í málinum og samtyktir (viðv. viðheft mál)

Bygningurin á Sjógøtu 2 er grundarlag undir arbeiðinum. Kommunan hevur keypt partin hjá Føroya Banka og yvirtikið ognina, samstundis sum **leigusáttmáli** er galdandi fyri part av ognini, sum Føroya Banki leigar.

Umsitingin (kommunustjóri og teknisk deild) hevur gjørt innanhýsis uppmáting og tørvsmeting og er komin fram til ein innrætting, sum gagnnýtir fermetrarnar best møguligt og gevur rúm til metta tørvin.

## 3. Skipan – verkætlanarstýring og kostnaðarramma

Umsitingin hevur **átikið sær sjálv at planleggja og stýra arbeiðinum** við innrættingini, fyri at tryggja at hølini samsvara við **ynski og veruligan tørv**, og fyri at kunna **tillaga tilgongdina leypandi** í takt við framdrift og fortreytir í bygninginum. Hetta verður eisini gjørt fyri at halda arbeiðið **innan fyri avsettu játtanina**.

Samstundis verður upplýst, at **projektering og mettur kostnaður** fyri dagføring/innrætting av hesum slagi **liggur væl hægri enn játtanin**, og tí verður verkætlanin skipað stigvíst við greiðari raðfesting, so mest møguligt kann fremjast innan fíggjarkarmin.

## 4. Verkætlan – innihald og arbeiðsætlan (stigvíst)

**Stig 1: Uppmáting og tørvsmeting (gjørt)**

- Meta um stødd og tørv á rúmum/plássi
- Mál: pláss til skrivstovur til øll starvsfólk + felags-/serrúm (køk, toilettir, kopirúm, fundarrúm o.a.)
- Semja er um innanhýsis tekningar/loysn, har mest møguligt verður vunnið av rúmd og nýtili.

**Stig 2: Niðurtøka og upprudding í eystari lon (er gjørt jan. 2026)**

- niðurtøka av veggum og gomlari innrætting
- reinsan/ruddan av gomlum el, i-net o.ø.
  Endamálið hevur verið at fyrireika hæddina til nýggju rúmskipanina.

**Stig 3: Uppbygging og liðugtgerð øll ovara hæddin (írestar)**

- uppbygging av gólvum og nýggjari innrætting (vegir/loysnir)
- endalig støðutakan til tilfar og loysnir, herundir:
  - glasveggir (har tað er hóskandi)
  - ljóðdoyvingarloftir
  - gólv (mælt verður til **teppifílsar**)
  - loftloysn (t.d. **tolddekk**)
- el: **LED** við **automatikk** (har tað er hóskandi)

## 5. Útinnan – lokal arbeiðsorka og keyp

Arbeiðið verður gjørt í mest møguligan mun av **lokalum handverkarum**, og tilfar verður keypt lokalt, tá tað ber til. Inventar o.a. verður bílagt eftir tørvi, tá endaligar loysnir og rúmloysnir eru fastlagdar.

## 6. Tíðarætlan og treytir

Miðað verður eftir, at **ovara hædd verður liðug í inniverandi ári**, men hetta er tengt at:

- at **Føroya Banki** kann flyta í **niðaru hædd**, tá arbeiðið krevur tað, og
- at játtanir og fígging halda, so framdriftin kann tryggjast.

Tá "estari" partur er liðugur og Føroya Banki er fluttur í niðarihæddina, verður **vestari partur** umvældur og tillagaður tilsvarandi, sambært fyriliggjandi innanhýsis ætlan.

## 7. Fíggjarviðurskifti og játtan

Á **FÆ2026** er játtað **2,0 mió. kr.** til endamálið. Umsitingin miðar eftir at fáa **mest møguligt framt fyri hesa upphædd**, sum er munandi minni enn projektering og mettir kostnaðir fyri dagføring/innrætting av hesum slagi.

## 8. Heimild og grundarlag

Heimildin at fremja ætlanirnar byggir á:

- játtan á **FÆ2026**, og
- samtyktir og skjøl í viðheftu málum, m.a.:
    1. **Mál 25_00135:** Keyp av partinum hjá Føroya Banka av matr.nr. 374, Sjógøtu 2 (við skeyti/leigusáttmála)
    2. **Mál 25_00459:** Føroya Banki – dagføringar av partinum sum Føroya Banki leigar á matr.nr. 374, Sjógøtu 2

## 9. Umsitingin mælir til

Umsitingin mælir Fíggjarnevndini til at samtykkja:

1. at arbeiðið við stigvísari tillaging av **ovaru hædd á Sjógøtu 2** heldur fram sambært fyriliggjandi innanhýsis ætlan/tekningum, við endamáli at flyta umsitingina í inniverandi ári.
2. at umsitingin fær heimild at endaliga **støðutaka til tilfar og loysnir** (gólv, loft, veggir/glas, ljóðdoyving og el/LED við automatikk) **innan fyri játtaðan karm**.
3. at arbeiðið verður samskipa við flutning og umskipan hjá **Føroya Banka** til niðaru hæddina, tá hetta er ein fortreyt fyri fullari framdrift og seinni stigum.

**Lógargrundarlag:**
**Kommunufulltrúin**

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Játtan avsett á FÆ2026, kr. 2.mió

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**<u>Fíggjarnevndin 19. februar 2026:</u>**
Borgarstjórin mælir til at umsitingin fær heimild til at fremja eina stigvísa tillaging av bygninginum á Sjógøtu 2 (matr.nr. 374), innanfyri verandi játtan á FÆ2026, soleiðis at umsitingin hjá Tvøroyrar kommunu kann flyta í ovaru hædd í inniverandi ári. -Einmælt samtykt

**<u>Býráðið 26. februar 2026:</u>**
Anita Vibergsdóttir hevur broytingaruppskot um at málið verður beint í Teknisku nevnd.

Kristin Michelsen mæli býráðnum til at samtykkja uppskotið hjá fíggjarnevndini.

Atkvøtt verður um tilmælið hjá Aniti Vibergsdóttir:
Fyri eru: Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Barbara Tausen og Arnfinn Bech, uppskotið er samtykt og verður beint í Teknisku nevnd.

**<u>Kommunustjórin 27.02.2026:</u>**
Á býráðsfundinum 26. februar 2026, varð samtykt, at umsitingin ikki kann halda áfram við arbeiðnum á Sjógøtu 2, nú býráðið valdi at beina málið í Teknisku nevnd áðrenn endalig støðutakan.

Hetta hóast tað, at fíggjarætlanin fyri **2026** hevur játtað **kr. 2,0 mió.** til at tillaga bygningin. og at Fíggjarnevndin hevur samtykt 19. feb. 2026, *at umsitingin fær heimild til at fremja eina stigvísa tillaging av bygninginum á Sjógøtu 2 (matr.nr. 374), innanfyri verandi játtan á FÆ2026, soleiðis at umsitingin hjá Tvøroyrar kommunu kann flyta í ovaru hædd í inniverandi ári.*

Býráðið hevur eisini samtykt hin **29.09.2025:**
*"at heimila umsitingini at arbeiða víðari við ætlanini saman við BRIM Ark. um at umvæla eystara partin av bygninginum, soleiðis at hesin kann hýsa umsitingini hjá Tvøroyrar kommunu.*

**Meting av núverandi støðuni**
Arbeiði sum er byrjað, verður steðgað, inntil politiska viðgerðin er liðug og umsitingin fær greiðu á, endaliga leiðbeining og heimild frá teknisku nevnd og býráðnum, hvussu farast skal víðari fram við at innrætta Sjógøtu 2 til umsitingarligan bygning.

**Hvat merkir hetta í praksis**
- Arbeiðið, -ið er komið væl áleiðis- steðgar beinanvegin.
- Steðgurin varðar, inntil Tekniska nevnd og Býráðið hava viðgjørt ætlanina og boðað frá, hvussu innrætting og framhald skal skipast.
- Tørvur er at fáa greiðu á um arbeiði skal heildar projekterast - og bjóðast út í heildarenteprisu ella í fakenteprisur. -og hvønn leiklut umsitingin hevur í hesar tilgongd
- Eftir viðgerð í Teknisku nevnd verður málið lagt fyri býráðið aftur til endaliga støðutakan.
- Endamálið er, at umsitingin fær greiða politiska leiðbeining/heimild um, hvussu farast skal fram við dagføðingararbeiðinum, so Sjógøta 2 kann hýsa umsitingini hjá kommununi, sambært politisku raðfestingini.

**Næstu stig, samsv. samtyktini 27.02.2026**
1. Tekniska nevnd fær málið til viðgerðar (ætlan, raðfesting, kostnaðarrammu, arbeiðsgongd/útboð og hvussu játtan á FÆ2026 kr. 2,0 mió. verða nýttar).
2. Málið verður síðan lagt fyri býráðið aftur til endaliga politiska avgerð/heimild.
3. Eftir hetta kann umsitingin halda fram við greiðari og politiskari leiðbeining.

**<u>Tekniska nevnd 09. marts 2026:</u>**
Nevndin mælir til, at teir partar, sum arbeiða og hava arbeitt á Sjógøtu 2, fáa greitt frá umsitingini at vita, hvussu arbeiðið skal halda fram. Nevndin ynskir, at umsitingin leggur ætlanir viðvíkjandi eystara parti av Sjógøtu 2 fram fyri nevndina, og eina meting av, hvussu langt verkætlanin røkkur fyri tær 2 mió., sum eru avsettar til arbeiðið á FÆ2026.
Nevndin heldur ikki, at málið er rætt handfarið, áðrenn arbeiðið í eystara enda varð sett í gongd. Einmælt samtykt.

**<u>Kommunustjórin 10.03.2026:</u>**
Kommunustjórin tekur samtyktina hjá Teknisku nevnd til eftirtektar. Upplýsast skal, at málið er handfarið á sama hátt sum onnur líknandi mál, har umsitingin roynir at fordeila arbeiðstøkurnar millum lokalar handverkarar eftir kostnaði, førleikum og tíðarætlanum.

Til kunningar kann upplýsast, at á fíggjarætlanini fyri 2026 eru avsett kr. 2,0 mió. til at tillaga bygningin á Sjógøtu 2 til kommunuskrivstovu. Harumframt samtykti býráðið 29. september 2025 at heimila umsitingini at arbeiða víðari saman við BRIM við ætlanini at umvæla/dagføra eystara partin til kommunuskrivstovu. Eisini samtykti fíggjarnevndin 19. februar 2026 einmælt at heimila umsitingini at

fremja eina stigvísa tillaging soleiðis at umsitingin hjá Tvøroyrar kommunu kann flyta inn í ovaru hædd í inniverandi ári.

**Fíggjarnevndin 10. marts 2026:**
Borgarstjórin mælir til at halda fast við samtyktina í fíggjarnevndin 19. februar 2026, at at umsitingin fær heimild til at fremja eina stigvísa tillaging av bygninginum á Sjógøtu 2 (matr.nr. 374), innanfyri verandi játtan á FÆ2026, soleiðis at umsitingin hjá Tvøroyrar kommunu kann flyta í ovaru hædd í inniverandi ári, og at umsitingin kunnar um tilgongdini loypandi til býráðið. -Fyri eru Bjarni Hammer, Kristin Michelsen, Alvi Mortensen tekur støðu á býráðsfundi.

**Býráðið 27. mars 2026:**
Borgarstjórin mælir til at samtykkja tilmælið hjá fíggjarnevndini at heimila umsitingin at fremja eina stigvísa tillaging av bygninginum á Sjógøtu 2 (matr.nr. 374), innanfyri verandi játtan á FÆ2026, soleiðis at umsitingin hjá Tvøroyrar kommunu kann flyta í ovaru hædd í inniverandi ári, og at umsitingin kunnar um tilgongdini loypandi til býráðið.

**Atkvøtt verður um tilmælið hjá borgarstjóranum:**
Fyri eru**:** Kristin Michelsen, Eyð Eidesgaard, Arnfinn Bech, Bjarni Hammer, Barbara Tausen og Alvi Mortensen
Ímóti: Ongin
Blankt: Anita Vibergsdóttir

Tilmælið samtykt.

## 26/26
## 26/00059-1 Tvøroyrar Havn - Burturkast frá skipum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 27.02.2026 | 2/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.03.2026 | 36/26 |
| 3 Býráðið | 27.03.2026 | 26/26 |

**Málslýsing: Tekniski leiðarin (GM) tann 28.01.2026**
Eftir áheitan frá havnameistaranum verður biðið um at endurskoða gjaldið, sum kommunan avroknar fyri at taka ímóti burturkasti frá skipum. Sum nú er, eru prísirnir fylgjandi:

- Burturkast frá skipum til Tvøroyrar havn: 280 kr + mvg/m3
- Burturkast frá Tvøroyrar havn til IRF: 245 kr + mvg/m3

Afturat gjaldinum til IRF kemur koyring, tá konteynarin skal tømast, sum er ein eyka útreiðsla fyri Tvøroyrar havn.
Eisini er handfaringin av burturkastinum ein eyka arbeiðsuppgáva hjá Tvøroyrar havn, eins og starvsfólk koyra burturkast til IRF við jøvnum millumbilum.

Til samanberingar (av heimasíðunum hjá Vágs- og Fuglafjarðar kommunu):

- Vágs havn 500 kr/m3
- Fuglafjarðar havn 450 kr/tons

**Lógargrundarlag:**

**Vinnu- og havnanevndin 27. februar 2026:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá havnameistaranum, og ásetur gjaldið fyri burturkast at vera 400 kr/m3 uttan mvg. Einmælt samtykt.

**Fíggjarnevndin 10. marts 2026:**
Fíggjarnevndin tekur einmælt undir við tilmælinum hjá Vinnu- og havnanevndini at áseta gjaldið fyri burturkast at vera 400 kr/m3 uttan mvg.

**Býráðið 27. mars 2026:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Vinnu- og havnanevndini og Fíggjarnevndini at áseta gjaldið fyri burturkast at vera 400 kr/m3 uttan mvg.

**27/26**
**26/00070-1 Tvøroyrar havn - Dagføring av el-prísum hjá Tvøroyrar havn**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 27.02.2026 | 6/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.03.2026 | 38/26 |
| 3 Býráðið | 27.03.2026 | 27/26 |

**Málslýsing: Tekniski leiðarin (GM) tann 09.02.2026**
Havnameistarin mælir til at hækka gjaldið, sum Tvøroyrar havn tekur fyri streymnýtslu á havnarlagnum (landstreym).

Sum nú er fakturerar kommunan 1,80 kr/kWt
SEV selir streym til kommununa fyri 1,86 kr/kWt

Havnameistarin mælir til, at eitt ávíst prosenttal skal leggjast omaná dagsprísin hjá SEV, soleiðis at kommunan ikki hevur eina útreiðslu av at levera landstreym, samstundis sum gjaldið kann regulerast, so hvørt sum streymprísurin hjá SEV broytist.

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:**
Mælt verður til at taka undir við tilmælinum hjá havnameistaranum, og leggja eitt fast prosentgjald omaná prísin, sum kommunan rindar fyri streymin frá SEV.

**Vinnu- og havnanevndin 27. februar 2026:**
Nevndin mælir til, at Tvøroyrar havn dagførir prísin fyri sølu av streymi á havnarlagnum til at vera 15 % hægri enn innkeypsprísin. Einmælt samtykt.

**Fíggjarnevndin 10. marts 2026:**
Fíggjarnevndin tekur einmælt undir við tilmælinum hjá Vinnu- og havnanevndini at dagføra prísin fyri sølu av streymi á havnarlagnum til at vera 15 % hægri enn innkeypsprísin.

**Býráðið 27. mars 2026:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Vinnu- og havnanevndini og fíggjarnevndini at dagføra prísin fyri sølu av streymi á havnarlagnum til at vera 15 % hægri enn innkeypsprísin.

[Gem]

## 28/26
## 25/00219-2 Víkingarlanghús og goymsla til SALT

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 02.06.2025 | 22/25 |
| 2 Tekniska nevnd | 11.09.2025 | 27/25 |
| 3 Fíggjarnevndin | 26.09.2025 | 94/25 |
| 4 Býráðið | 27.03.2026 | 28/26 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 28.05.2025**
Umsitingin hevur móttikið umsókn frá A *(sum skal verða goymsla fyri tað niðurtikna húsi, sum higartil er brúkt til goymslu).*

**Skriv verður í umsóknini:**
*Vit biðja við hesum um byggiloyvi at byggja víkingalanghús, jarnsmiðu og goymslu til Salt, sambært hjáløgdu tekningum dagf. 25.mai 2025. Bygningarnir verður staðsettur á matr. nr. 7a. sí eisini hjáløgdu tekningar.*

*Á tekningunum er eisini ein Stavkirkja teknað, sum møguliga kann byggjast her, men hetta er bert eitt hugskot - enn.*

*Víkingalanghúsið verður neyst hjá komandi víkingaskipi, sum byggjast skal í Langhúsinum, annars verður víst til tekst og tekningarnar.*

*Viðv. drátti til víkingaskipið verður hesin at staðsetast saman við Tvøroyra býráð.*

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 60 frá 15. mai 2012 um at byggja bygningar
Bygningskunngerð 2017
Byggisamtykt fyri Tvøroyrar Kommunu

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Teknisku nevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 02. juni 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Kommunustjórin 06.07.2025:**
Tórsdagin hin 3. juli 2025, var kunningarfundur í SALT um ætlanina at byggja víkingaskip, víkingalanghús, Jarnsmiðju og goymslubygning. Felagið Víkingaskip hevði bjóða øllum býráðslimum til framløgu í SALT. Niðurstøðan av fundinum varð, at Felagið Víkingaskipa ynskir at byggja víkingalanghús, Jarnsmiðju og goymslubygning á økinum vestan fyri SALT, og ynskir at hoyra frá

Tvøroyrar kommunu, hvørt tað ber til at fáa býggiloyvið samsv. innsendu tekningar og tilfar.

**Tekniska deild 10-09-2025**
Mælt verður til at býráðið tekur støðu til staðsetingina, sum ikki beinleiðis er í samsvar við uppruna ætlanini fyri økið, sum m.a. var skipan av parkeringsøki til SALT, og møgulig víðkan av SALT. Um býráðið tekur undir við staðsetingini, hevur deildin heimild til at viðgera byggimálið.

**Tekniska nevnd 11. september 2025:**
Nevndin mælir til at koyra málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. september 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað. Fíggjarnevndin er jalig fyri ætlanini, men mælir til, at fundur verður hildin við umsøkjaran "Albert Isfeldt, Ark." um ætlanina, áðrenn málið verður beint til býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Kommunustjórin 17.03.2026**
**Byggiloyvi til víkingalanghús, jarnsmiðju, vevstovu og goymslu til SALT á Drelnesi**

Tvøroyrar kommuna hevur móttikið dagførda umsókn frá **Albert Isfeld, arkitekti**, sum hevur sent inn umsóknina vegna verkætlanina 14. mars 2026. Í viðgerðarskjølunum frammanundan er verkætlanin knýtt at **Felagnum Víkingaskip**, og umsóknin verður tí viðgjørd sum ein umsókn, ið er latin kommununi vegna hesa verkætlan. Málið varð upprunaliga lagt fyri kommununa til viðgerðar við umsókn og tekningum dagfestum í mai 2025, og hevur verið viðgjørt politiskt frammanundan. Síðani tá eru nakrar broytingar gjørdar í tilfarinum og tekningunum, hóast ætlanin í høvuðsheitum er tann sama. Viðheft hesum máli eru tí bæði dagførd málslýsing, skjøl og tekningar.

Sambært umsóknini og hjáløgdu tekningunum er talan um eina verkætlan í tilknýti at SALT á Drelnesi, har ætlanin er at byggja víkingalanghús, jarnsmiðju, vevstovu og goymslu. Víkingalanghúsið er ætlað sum neyst og karmur um komandi víkingaskip, ið ætlanin er at byggja á staðnum. Harumframt verður upplýst, at dráttur til víkingaskipið verður staðsettur í samráð við Tvøroyrar býráð.

Verkætlanin er partur av einari størri heildarætlan fyri økið við SALT á Drelnesi, har nýggir bygningar og nýggj nýtsla skulu stuðla undir mentanarvirksemi, søguliga miðling, handverksvirksemi, framsýningar og upplivingar. Bygningarnir eru ætlaðir at verða partur av samlaða umhvørvinum rundan um SALT og havnalagið, og skulu styrkja samleikan og virksemið á økinum.

Málið hevur verið til umrøðu áður. Sambært undanfarnu viðgerðini varð málið fyrst lagt fyri býráðið 2. juni 2025, síðani viðgjørt í Teknisku nevnd 11. september 2025 og í Fíggjarnevndini 26. september 2025. Í teirri viðgerðini varð víst á, at staðsetingin skuldi metast í mun til upprunaligu ætlanina fyri økið, m.a. við atliti at parkeringsviðurskiftum og møguligari víðkan av SALT, og at fundur skuldi haldast við umsøkjaran um verkætlanina, áðrenn endalig støðutakan varð tikin.

Við hesum verður málið nú lagt fram av nýggjum til støðutakan um byggiloyvi út frá dagførda grundarlagnum. Umsitingin metir, at býráðið eigur at taka støðu til sjálva ætlanina og staðsetingina, og um heimild skal gevast umsitingini at fremja endaligu viðgerðina sambært galdandi reglum og teimum treytum, ið annars galda sambært byggisamtykt, bygningskunngerð, brunakrøvum, kloakkviðurskiftum og øðrum viðkomandi krøvum.

Víst verður á, at ætlaða byggingin er staðsett á øki E sambært Almennari byggisamtykt fyri Tvøroyrar kommunu við áseting í § 31 um, at økið er lagt av til alment endamál, herundir mentanarlig endamál o.a.t.

Umsitingin metir tí, at verkætlanin skal metast í mun til, um hon er í samsvari við endamálið fyri økið, og um treytirnar annars í byggisamtyktini eru loknar, herundir um byggistigið er innan fyri loyvda markið á 0,4, og um neyðuga byggiætlanin kann góðkennast av býráðnum.

**Málið verður sostatt lagt fyri býráðið til viðgerðar og støðutakan.**

**Dagføring/ískoyti**
Kommunan hevur tann 21. mars 2026 móttikið skriv frá Felagnum Víkingaskip sum ískoyti og dagføring til innkomnu umsóknina um byggiloyvi til Víkingverkætlanina. Í skrivinum verður kunnað um nýggja nevndarsamanseting felagsins, og at nevndin einmælt tekur undir við umsóknini.

**Býráðið 27. mars 2026:**
Borgarstjórin mælir til at geva loyvið til fyriliggjandi ætlan á matr. nr. 7a á Drelnes, og at heimila umsitingini at fremja endaligu viðgerðina sambært galdandi reglum og teimum treytum, ið annars galda sambært byggisamtykt, bygningskunngerð, brunakrøvum, kloakkviðurskiftum og øðrum viðkomandi krøvum.

**Atkvøtt verður um tilmælið hjá borgarstjóranum:**
**Fyri eru:** Kristin Michelsen, Alvi Mortensen, Eyð Eidesgaard og Bjarni Hammer.
**Ímóti eru:** Arnfinn Bech, Barbara Tausen og Anita Vibergsdóttir

**Tilmælið samtykt**

Arnfinn Bech ynskir viðmerkt, at um Tvøroyrar býráð gevur byggiloyvið til fyriliggjandi ætlan, mælir hann til at Tvøroyrar kommuna steðgar við at veita stuðul til Salt.

Anita Vibergsdóttir ynskir viðmerkt, at hon er ímóti, tí hon heldur at málið er ov illa lýst, og hon kann tí ikki taka støðu uppá verandi grundarlag.

Barbara Tausen mælir til at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini um at hava fundi við arkitektin um ætlanina.

## 29/26
## 25/00445-1 Cruise-ferðavinna - ferðamannaskip

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 23.09.2025 | 23/25 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.09.2025 | 90/25 |
| 3 Býráðið | 29.09.2025 | 72/25 |
| 4 Býráðið | 10.11.2025 | 85/25 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.11.2025 | 12/25 |
| 6 Býráðið | 27.11.2025 | 31/25 |
| 7 Vinnu- og havnanevndin | 27.02.2026 | 4/26 |
| 8 Fíggjarnevndin | 10.03.2026 | 33/26 |
| 9 Býráðið | 27.03.2026 | 29/26 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 18.09.2025**
Tvøroyrar kommuna ynskir at styrkja ferðavinnuna, har í eisini at gera Tvøroyri meira áhugavert fyri ferðamannaskip.

Umboð fyri kommununa hava luttikið á Cruise-messu í Hamburg í september 2025, har fundir vórðu hildnir við altjóða aktørar á økinum. Nakrir av aktørunum hava víst stóran áhuga fyri at hava Tvøroyri við sum eina nýggja destinatión í teirra rutum, og hevur kommunan eftirfylgjandi havt fundir við áhugaðir aktørar, sum ynskja at vitja Tvøroyri.

Umsitingin søkir tí heimild til, at arbeiða víðari saman við hesum aktørum, so møguleikarnir kunnu mennast til ítøkilig átøk fyri at fáa fleiri ferðamannaskip og fleiri ferðafólk til Tvøroyri.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Mælt verður til, at játtan verður veitt av FÆ2025, §719, íløgur í Tvøroyrar Havn, og um mett neyðugt við eykajáttan.

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið vinnu- og havnanevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Vinnu- og havnanevndin 23. september 2025:**
Nevndin mælir til, at umsitingin fær heimild til at arbeiða víðari við hesum málinum. Einmælt samtykt.

**Kommunustjórin 26.09.2025**
Borgarstjórin og kommunustjórin mæla til at Tvøroyrar kommuna tekur av avtaluni við Nordic Port Group AB, og at umsitingin fær heimild at arbeiða víðari samsvarandi hesa avtaluna.

**Fíggjarnevndin 26. september 2025:**
Fíggjarnevndin samtykkir einmælt tilmælið hjá borgarstjóra og kommunustjóranum at taka av fyriliggjandi avtaluni við Nordic Port Group AB, og at avtalan verður fíggja við eykajáttan av §721 "Íløga Bátahavnin". Borgarstjórin kunnar um, at umboð fyri Nordic Port Group AB vitja á Tvøroyri tórsd. 13. november og eru her til sunnudagin 16 november. Mælt verður til, at allir býráðslimir møtast við umboðum frá Nordic Port Group AB, t.d. fríggjadagin 14. nov. í SALT. -Málið verður beint í býráðið

**Býráðið 29. september 2025:**
Býráðið samtykkir einmælt tilmælið hjá Fíggjarnevndini, borgarstjóranum og kommunustjóranum um at taka av fyriliggjandi avtaluni við Nordic Port Group AB, og at avtalan verður fíggjað við eykajáttan av §721 "Íløga bátahavnin".

**Býráðið 10. november 2025:**
Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**Kommunustjórin 18.11.2025:**
Tvøroyrar kommuna og Nordic Port Group undirskrivaðu samstarvsavtalu í SALT fríggjadagin 14. november.

**Fíggjarnevndin 20. november 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 27. november 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Vinnu- og havnanevndin 27. februar 2026:**
NPG eftirlýsir, at ein samskipari verður settur, sum verður toghaldari millum NPG, Tvøroyrar kommunu og ferðavinnuveitarar á staðnum, og hevur yvirskipaða leiðslu, tá ferðamannaskip koma inn. Samstundis eftirlýsa teir, at samskipanin verður staðsett í einum hølum tætt við havnarlagið. Einmælt samtykt.
Nevndin mælir til, at NB Consulting framvegis verður bindiliðið millum NPG, Tvøroyrar kommunu og ferðavinnuveitarar á staðnum, og nevndin mælir til, at staðsetingin er í hølunum hjá Gl. Kgl. Handlinum á havnarlagnum. Einmælt samtykt.
Tað hevur stóran týdning, at arbeiðið við at gera hølini og atkomuviðurskiftini nøktandi til at taka ímóti ferðafólki og harvið eisini fólki, sum nýta koyristól. Einmælt samtykt.

**Fíggjarnevndin 10. marts 2026:**
Fíggjarnevndin samtykkir einmælt at taka undir við tilmælinum hjá vinnu- og havnananevndini um, at NB Consulting framvegis verður bindiliðið millum NPG, Tvøroyrar kommunu og ferðavinnuveitarar á staðnum, og at samskiparin fær atkomu til hølini Gl. Kgl. Handlinum á havnarlagnum, sum ein royndarætlan.

Samstundis verður dentur lagdur á, at hølis- og atkomuviðurskiftini verða gjørd nøktandi til móttøku av ferðafólki, herundir eisini fyri fólki, sum nýta koyristól.

Fíggjarnevndin mælir til at heimilað umsitingini at samráðast við relevantar partar um ítøkiligu skipanina og fremja hesa royndarætlan, sum verður endurskoða seinni í heyst.

**Býráðið 27. mars 2026:**
Form. í Vinnu- og havnanevndini, Bjarni Hammer greiðir frá ætlanini, og mælir til at býráðið samtykkir fyriliggjandi tilmælið.

**Atkvøtt verður um tilmælið hjá Vinnu- havnanevndini og Fíggjarnevndini:**
**Fyri eru:** Kristin Michelsen, Alvi Mortensen, Eyð Eidesgaard og Bjarni Hammer, Barbara Tausen og Anita Vibergsdóttir
**Ímóti eru:** Arnfinn Bech,
Arnfinn Bech ynskir viðmerkt, at hann er í móti, tí hann ikki kennir hvat ætlanin kemur at kosta og at ætlanin ikki er bjóða út.

**Tilmælið samtykt.**

**30/26**
**25/00509-1 Kunningarstovan -Gaml. Kgl. Handlinum "Krambúðin"**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.11.2025 | 126/25 |
| 2 Býráðið | 27.11.2025 | 97/25 |
| 3 Mentanarnevndin | 14.01.2026 | 1/26 |
| 4 Vinnu- og havnanevndin | 27.02.2026 | 7/26 |
| 5 Fíggjarnevndin | 10.03.2026 | 34/26 |
| 6 Býráðið | 27.03.2026 | 30/26 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 12.11.2025**

## Tilmælið um royndarverkætlan: Kunningarstova í Krambúðini á Havnarlagnum.

Tvøroyrar kommuna hevur í longri tíð havt skiftandi fólk at manna Kunningarstovuna, og raksturin hevur verið merktur av broytingum í bæði arbeiðstíð og uppgávuinnihaldi. Seinast var tað [redacted], sum røkti uppgávuna, men gavst 31. oktober í ár.

Kommunustjórin hevur síðani kannað møguleikar fyri at skipa kunningartænastuna á ein nýggjan, burðardyggan og vinnuliga haldføran hátt.
Býráðið samtykti hin 26. okt. 2023, at Kunningarstovan skuldi húsast í bygninginum á Sjógøtu 2, har hóskandi hølir eru tætt við miðbýin. Hetta letur seg tó fyribils ikki gera, tí Apotekið leigar hølini, har Kunningarstovan skuldi vera.

Ma. av hesari orsøk mælir kommunustjórin til, at Tvøroyrar kommuna fer undir eina roynarverkætlan, har raksturin av Kunningarstovuni verður skipaður sum eitt samstarv við einum privatum driftsleiðara.

## Endamál og hugsan

Endamálið við verkætlanini er at:

- tryggja eina fasta, álítandi og tíðarhóskandi kunningartænastu fyri ferðafólk, gestir og borgarar,
- skapa meira lív, virksemi og trivnað á havnalagnum,
- og samstundis at menna samstarv millum kommunu og ferðavinnuna á einum fíggjarliga varligum grundarlagi.

Talan er um eina tíðaravmarkaða royndarverkætlan í t.d. trý ár, sum kann leingjast eftir meting og tørvi. Modellið byggir á eitt OPP-líknandi samstarv, har kommunan tryggjar tænastuna og karmarnar, meðan ein privatur driftsleiðari fær ábyrgdina av dagligum rakstri og vinnupartinum.

## Staðseting og karmar

Mælt verður til at Kunningarstovan verður staðsett í Krambúðini á havnalagnum, sum Tvøroyrar kommuna eigur, og sum áður hevur hýst bæði handils- og sýningarvirksemi.
Bygningurin hevur serligan søguligan og mentanarligan týdning sum Gamli Konguligi Handilin, og hann liggur sera væl fyri – mitt í ferðavinnuøkinum á Tvøroyri.

Kommunan letur viðkomandi driftsleiðara innivist í hølunum, og kommunan ber útreiðslurnar fyri ljós og hita, sum longu verður gjørt í dag.
Kommunan tekur harumframt á seg at dagføra og tillaga hølini í trá við friðingarkrøv, soleiðis at tey kunnu nýtast til bæði kunning og cafévirksemi.

**Sum liður í hesum verður m.a. keypt:**

- ein professionell barista-kaffimaskina, (Uml. kr. 40.000,-)
- borð og stólar til gestapláss,
- og annað neyðugt innbúgv og upplýsingartilfar,
  sum verður ogn hjá kommununi.

## Rakstur og ábyrgdarbýti

Kommunan ger tænastusáttmála við ein privatan driftsleiðara, ið fær ábyrgd fyri dagliga rakstrinum av Kunningarstovuni.

Sáttmálin skal m.a. áseta:

- uppgávur og tænastur, ið skulu veitast (gestamóttøka, kunning, digital dagføring o.s.fr.),
- upplatingartíðir,
- samsýning frá kommununi,
- og skyldu at leggja fram virksemisfrágreiðing td. 3–4 ferðir um árið.

Driftsleiðarin fær eina samsýning fyri at røkja áhugamál kommununnar, meðan hann samstundis fær fríar karmar at reka Caféina sum sjálvstøðugt vinnuligt virksemi.

## Café og vinnupartur

Driftsleiðarin fær loyvi at reka eina Café í Krambúðini, sum ikki er knýtt til kommununa.
Caféin verður rikin á privatum grundarlagi, og driftsleiðarin stendur sjálvur fyri roknskapi, inntøkum og útreiðslum og starvsfólkum.

**Kommunan setur tó hesar kláru treytir:**

- skeinkiloyvi verður ikki givið,
- at kaffi, kakur og lætt ábit verður til keyps,
- og at Kunningarstovan skal vera opin minst frá kl. 10.00 til 15.00 hvønn gerandisdag.

Hetta tryggjar, at staðið er livandi og opið í mest virknu tímunum, og at gestir altíð finna eina jaliga og professionella móttøku.

## Lógargrundarlag

Sambært kommunalrættarligum meginreglum og teimum yvirskipaðu karmunum í kommunustýrislógini kann kommunan lata uttanhýsis part røkja eina uppgávu, treytað av, at talan er um eina uppgávu, sum kommunan sjálv hevur heimild at røkja. Ferðafólkakunning og rakstur av kunningarstovu kunnu í hesum sambandi skipast sum ein kommunal tænasta. Kommunan kann tí gera sáttmála við ein privatan rakstrarveitara um at veita hesa tænastu, uttan at kommunan sjálv rekur café- ella annað vinnuligt virksemi. Talan er sostatt ikki um at víðka kommunalu uppgávuna, men um at skipa raksturin av eini kommunalari tænastu á annan hátt innan galdandi heimildir.

## Fíggjarligar avleiðingar
Fíggjarliga kann skipanin leggjast til rættis sum ein avmarkað og fyrisitingarlig kommunal útreiðsla. Kommunan rindar fyri sjálva kunningartænastuna, eitt nú við fastari samsýning og møguligum vanligum rakstrarútreiðslum, meðan tann privati rakstrarleiðarin sjálvur ber ábyrgd og váða av cafépartinum og øðrum vinnuligum virksemi. Harvið fær kommunan eina tænastu veitta uttan sjálv at fara inn á vinnuliga marknaðin.

## Tíðaravmarkað verkætlan og eftirlit
Verkætlanin er tíðaravmarkað til t.d. trý ár við møguleika fyri leingjan.
Driftsleiðarin skal hava regluligt samskifti við kommununa og leggja fram virksemisfrágreiðing 3–4 ferðir um árið. Kommunan kann seta minstukrøv til tænastustig og trygd og hevur rætt til at endurskoða ella uppsiga avtaluna, um krøvini ikki verða hildin.

## Fíggjarlig avleiðing:
Mettur kostnaður til íløgu FÆ2026: kr. 450.000,-
- *Nakað av hesum skal kortini gerast m.a. nýggj uttandura trappa kr. 150.000,-*
- *Innbúgv og info skerm kr: 300.000,-*

Rakstur av kunningarstovu:
- Rakstrarkostnaður: kr./ár 350.000,-
- *Ex. ljós og hiti -sum kommunan ber kostnaðin av frammanunda*

## Tilmæli
Kommunustjórin mælir til at umsitingin fær heimild til at realisera ætlanina har:
Tvøroyrar kommuna setur í verk eina royndarverkætlan fyri Kunningarstovu í Krambúðini á Tvøroyri,

har kommunan:
- letur hølir, ljós og hita,
- ger avtalu við ein driftsleiðara um rakstur av Kunningarstovuni,
- og tryggjar, at tænastan verður veitt sambært krøvum og ynskjum hjá kommununi.

Verkætlanin verður mett sum lógliga, fíggjarliga og vinnuliga trygg,
og hevur týdning fyri at skapa lív, trivnað og ferðavinnuvirksemi á Tvøroyri og á havnalagnum.

Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan.

## Fíggjarnevndin 20. november 2025:
Einmælt samtykt tilmælið hjá kommunustjóranum, at heimila umsitingini at kommunan arbeiðir víðari við fyriliggjandi uppskot um at kunningarstovan verður staðsett í gomlu Krambúð á havnalagnum.

## Býráðið 27. november 2025:
Einmælt samtykt at málið verður beint í vinnu- og havnanevndina.

## Mentanarnevndin 14. januar 2026:
Málið var umrøtt og kunnað.

## Vinnu- og havnanevndin 27. februar 2026:

Nevndin heldur, at farast skal víðari við fyriliggjandi uppskoti, og tað hevur týdning, at tað verður sett í gongd, áðrenn ferðavinnutíðin (sesongin) í ár byrjar av álvara. [redacted], hevur víst stóran áhuga í at vera partur av hesari verkætlanini við at taka á seg kommunalar tænastur samstundis við at reka ferðavinnuvirksemi út frá Gl. Kgl. Handlinum.

Nevndin metir, at omanfyrinevnda verkætlan sampakkar sera væl við niðanfyristandandi (Vísandi til samtykt í máli nr. 25/00445 Cruise-ferðavinna - ferðamannaskip (NPG- Nordik Port Group)):

*NPG eftirlýsir, at ein samskipari verður settur, sum verður toghaldari millum NPG, Tvøroyrar kommunu og ferðavinnuveitarar á staðnum, og hevur yvirskipaða leiðslu, tá ferðamannaskip koma inn. Samstundis eftirlýsa teir, at samskipanin verður staðsett í einum hølum tætt við havnarlagið. Einmælt samtykt.*
*Nevndin mælir til, at NB Consulting framvegis verður bindiliðið millum NPG, Tvøroyrar kommunu og ferðavinnuveitarar á staðnum, og nevndin mælir til, at staðsetingin er í hølunum hjá Gl. Kgl. Handlinum á havnarlagnum. Einmælt samtykt.*
*Tað hevur stóran týdning, at arbeiðið við at gera hølini og atkomuviðurskiftini nøktandi til at taka ímóti ferðafólki og harvið eisini fólki, sum nýta koyristól. Einmælt samtykt.*

Nevndin mælir til, at umsitingin skjótast gjørligt tekur samband við [redacted] og NB Consulting í eini roynd at fáa eina avtalu í lag. Hetta skal skipast sum ein royndarverkætlan í áleið 1 ár, hetta tí, at ferðavinnutíðin byrjar skjótt, so at klárt er at taka ímóti fyrsta ferðavinnuskipinum um hálvan mei.
Einmælt samtykt
Viðm.: Anita Vibergsdóttir var ikki við í viðgerðini av hesum málinum.

## Fíggjarnevndin 10. marts 2026:

Fíggjarnevndin tekur einmælt undir við tilmælinum hjá vinnu- og havnanevndini um at fara víðari við fyriliggjandi uppskoti og skipa hetta sum eina royndarverkætlan í áleið eitt ár, soleiðis at klárt er at taka ímóti ferðamannaskipum í inniverandi ferðavinnutíð. Dentur verður lagdur á, at hølis- og atkomuviðurskiftini í Gl. Kgl. Handlinum verða nøktandi, eisini fyri fólki, sum nýta koyristól. Umsitingin verður heimilað at samráðast við relevantar partar og arbeiða víðari við fíggjarligu og praktisku skipanini av verkætlanini.

### Býráðið 27. mars 2026:

Anita Vibergsdóttir var ikki við í viðgerðini av hesum málinum.
Form. í Vinnu- og havnanevndini, Bjarni Hammer greiðir frá ætlanini, og mælir til at býráðið samtykkir fyriliggjandi tilmælið.
**Atkvøtt verður um tilmælið hjá Vinnu- havnanevndini og Fíggjarnevndini:**
**Fyri eru:** Kristin Michelsen, Alvi Mortensen, Eyð Eidesgaard, Bjarni Hammer og Barbara Tausen.
**Ímóti eru:** Arnfinn Bech
Arnfinn Bech ynskir viðmerkt, at hann er í móti, tí hann metur at borgarar á Tvøroyri ikki fáa somu møguleikar, sum nevndu veitarar til hesa verkætlan, og at Tvøroyrar býráð ikki veit hvat kostnaðurin verður av hesari ætlan.

**Tilmælið samtykt**

**31/26**
**25/00159-5 Integratiónssamskipari**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 28.08.2025 | 18/25 |
| 2 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 15.10.2025 | 19/25 |
| 3 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 12.02.2026 | 7/26 |
| 4 Fíggjarnevndin | 19.02.2026 | 28/26 |
| 5 Býráðið | 27.02.2026 | 18/26 |
| 6 Býráðið | 27.03.2026 | 31/26 |

**Málslýsing:**
Sambært Løgtingslóg nr. 146 frá 20. desember 2024 um integratión, skulu allar kommunur í seinasta lagi tann 26.06.2026 hava *integratiónssamskipara.*

Brot úr lógartekstinum:

*Kommunalir integratiónssamskiparar*
**§ 4.** Hvør kommuna skal í seinasta lagi 1. juli 2026 hava integratiónssamskipara.
*Stk. 2.* Kommunurnar kunnu samstarva við aðrar kommunur um integratión og integratiónssamskiparar.
*Stk. 3.* Landsstýrisfólkið kann í samráð við kommunurnar áseta nærri reglur um integratiónsøkið og kommunalar integratiónssamskiparar, herundir reglur um, hvat skal gerast, um kommunurnar ikki halda sínar skyldur sambært løgtingslógini.

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 146 frá 20. desember 2024 um integratión

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Trivnaðar- og umhvørvisnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 10. april 2025:**
Nevndin mælir til, at trivnaðarfólkið tekur sær av at skipa fyri tiltakinum tíðliga í heyst.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 28. august 2025:**
Trivnaðarfólkið, Bjarni Nygaard og leiðarin fyri Tvøroyrar kvøld- og ungdómsskúla Noomi Michelsen vóru møtt á fundinum og tosaðu um ymisk evni at taka upp í sambandi við integratión. Nevndin mælir til, at tey skipa fyri einum integratiónstiltaki í novembur.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 15. oktober 2025:**
Nevndin er blivin kunnað um, at eitt starv til kunningarstovuna er lýst leyst. Í starvslýsingini er uppgávan sum integratiónssamskipari eisini nevnt. Nevndin vil heita á kommunustjóran at koma á næsta fund at greiða frá, hvørjar hugsanir liggja aftanfyri hetta valið.

**Viðm. Tekniski leiðarin (GM) tann 11.02.2026:**
Skriv er komið frá borgarstjóranum í Vági vegna Vágs-, Sumbiar-, Hovs- og Porkeris kommunu. Teir leggja upp til, at allar kommunurnar í oynni samstarva um felags integratiónssamskipara.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 12. februar 2026:**
Nevndin mælir til at fara í eitt samskifti við hinar kommunurnar í oynni um eitt samstarv við felags integratiónssamskipara fyri alla oynna.

**Fíggjarnevndin 19. februar 2026:**
Fíggarnevndin mælir til, at forkv. í Trivnar- & umhvørvisnevndini tekur upp samskiftið við kommunurnar í Suðuroynni um møguligt samstarv.

**Býráðið 26. februar 2026:**
Borgarstjórin kunnar um málið og mælir til, at býráðið tekur undir við tilmælinum hjá Fíggarnevndin at forkv. í Trivnar- & umhvørvisnevndini tekur upp samskiftið við kommunurnar í Suðuroynni um møguligt samstarv. -Einmælt samtykt.

**Kommunustjórin 27.03.2026: (ískoyti til omanfyri málslýsing):**
Vísandi til samandráttin frá fundi 26. mars 2026 um felags integratiónssamskipara fyri kommunurnar í Suðuroy, verður málið hervið dagført við nýggjari støðu.

Á fundinum var semja millum luttakandi kommunur um at seta á stovn eina felags skipan við einum integratiónssamskipara, sum skal tæna øllum kommununum í oynni. Skipanin verður sett í verk sum ein 3 ára royndarskipan, við eftirmeting eftir 2 árum. Starvið verður áleið 0,8–1,0 fulltíðarstarv við fleksiblum arbeiðstíðum, tillagað tørvinum í kommununum.

Semja varð eisini um, at setanarbólkur verður mannaður við trimum limum, har Tvøroyrar og Vágs kommunur hvør tilnevna eitt umboð, umframt eitt umboð við royndum innan økið. Setanarbólkurin fær fulla heimild til at seta integratiónssamskiparan.

Arbeiðsgevaraskapur og umsitingarligar uppgávur, herundir løn, útgerð og licensir, verða annaðhvørt umsitin av Tvøroyrar ella Vágs kommunu. Kostnaðurin verður býttur millum kommunurnar sambært fólkatali. Starvsstaðurin verður býttur millum fyrisitingarnar hjá Tvøroyrar og Vágs kommunum.

Harumframt varð avtalað at lýsa starvið skjótast gjørligt við freist á 3 vikur, og at starvssetanin skal fara fram í seinasta lagi 1. juli 2026, samsvarandi lógarásetingunum. Kommunurnar eru eisini samdar um at gera eitt felags tíðindaskriv í sambandi við starvslýsingina.

Allar aðrar kommunur í Suðuroy hava longu tikið undir við uppskotinum, treytað av at allar kommunurnar taka lut. Tvøroyrar kommuna skal tí taka støðu til, um kommunan ynskir at vera partur av samstarvinum og góðkennir tær treytir og karmar, sum eru ásettir í samandráttinum frá fundinum.

Málið verður lagt fyri býráðið til støðutakan, við tí endamáli at kunna geva svar til hinar kommunurnar innan ásettu freistina 10. apríl 2026.

**Stutt samanumtøka:**
Tvøroyrar býráð skal taka støðu til, um kommunan ynskir at luttaka í samstarvinum um ein felags integratiónssamskipara í Suðuroynni, og at góðkenna treytirnar fyri samstarvinum.

Harumframt skal býráðið taka støðu til, um Tvøroyrar kommuna ynskir at átaka sær arbeiðsgevaraskapin og umsitingarligu uppgávurnar. Eisini skal støða takast til karmarnar fyri fíggjarligu býtislyklinum eftir fólkatali, og at starvsstaðurin hjá integratiónssamskiparanum er í fyrisitingini -hjá bæði Tvøroyrar og Vágs kommunum-, har kommunurnar útvega starvsstað til samskiparan.

**Býráðið 27. mars 2026:**
Forkvinnan í Trivnaðar- og Umhvørvisnevndini, Eyð Eidesgaard, greiðir frá ætlanini og mælir til, at býráðið tekur undir við, at allar kommunur í Suðuroynni samstarva um integratiónssamskipanina, og at karmarnir fyri fíggjarliga býtislykilin verða lagdir eftir fólkatalinum í hvørjari kommunu sær.
Mælt verður til, at Tvøroyrar kommuna átekur sær arbeiðsgevaraleiklutin og røkir fyrisitingarligu uppgávurnar, sum eru knýttar at hesum starvinum.

Eisini verður mælt til, at starvsstaðurin hjá integratiónssamskiparanum verður í fyrisitingini hjá bæði Tvøroyrar og Vágs kommunu, har kommunurnar útvega samskiparanum starvsstað.
**Einmælt samtykt.**

**32/26**
**26/00144-2 RFF -Ráðið fyri Ferðslutrygd ársfundur 2026**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 27.03.2026 | 32/26 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 27.03.2026**
Við hesum verður boðað frá, at ársfundur í Ráðnum fyri Ferðslutrygd verður hósdagin 16. apríl 2026 kl. 09.00 á Hotel Hafnia.

Heitt verður á limirnar at boða frá, hvør møtir teirra vegna á ársfundinum í seinasta lagi týsdagin 7. apríl 2026 kl. 12.00 umvegis teldupost til rff@rff.fo.

**Skrá fyri ársfundin:**

- Vælkomin og val av fundarstjóra
- Setanarrøða
- Ársfrágreiðing fyri 2025
- Nevndarval
- Fakligar framløgur um súkkluárið og ábæra ferðslu
- Framløga og góðkenning av roknskapi
- Val av grannskoðara
- Innkomin mál og ymiskt

Nevndarval er annað hvørt ár, og í 2026 standa forkvinnan og tveir starvsnevndarlimir fyri vali, umframt at tveir varalimir skulu veljast. Sitandi forkvinna tekur ikki við afturvali, og uppskot er um nýggja forkvinnu.

**Lógargrundarlag:**

- Formaðurin kallar inn við 30 daga freist (§5)
- Uppskot til viðgerðar á ársfundinum skulu vera formanninum í hendi í seinasta lagi 14 dagar fyri fundin og verða send limunum 7 dagar fyri (§6)
- Hvør limur sendir eitt umboð við heimild at taka støðu (§4)

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður mælt til, at býráðið tilnevnir eitt umboð at luttaka á ársfundinum og gevur hesum heimild at taka støðu vegna kommununa.

**Býráðið 27. mars 2026:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**33/26**
**26/00109-2 FSR -Umsokn um fíggjarligan stuðul róðrarárið 2026**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 11.03.2026 | 32/26 |
| 2 Býráðið | 27.03.2026 | 33/26 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 10.03.2026**
Umsitingin hevur móttikið umsókn um stuðul frá FSR Froðbiar Sóknar Róðrarfelag, har felagið m.a. skrivar at:

> *Eg skal vegna Froðbiar Sóknar Róðrarfelag søkja Tvøroyrar Kommunu um fíggjarligan stuðul fyri róðrarárið 2026. Í stuttum kann eg greiða eitt sindur frá, hvussu støðan hjá FSR er við manningum og bátum beint nú. Tað er eisini í hesum sambandið, at søkt verður um stuðul. 2025 var eitt sera gott ár, tá hugsað verður um tal av manningum. Ongantíð áður hevur felagið havt so nógvar manningar við á stevnu, á jóansøku luttóku heili 7 manningar fyri FSR. Ein skuldi trúð, at hetta var óført, men longu nú eitt ár seinni kann hetta talið tvífaldast, um ein vil. Soleiðis sum tað sær út beint nú, hava vit 12 manningar, sum hava ynskt at sleppa og rógva í summar*

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
- Stuðul til ítrótt FÆ2026, §524. Søkt verður um kr. 100.000,- til at rinda helvtina av kostnaðinum fyri umvæling og klárgering av bátum í 2026.

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 11. marts 2026:**
Forkv. mælir til at veita FSR stuðul á kr. 100.000,- samsv. teirra umsókn dagf. 9. mars. 2026. -Einmælt samtykt.

**Býráðið 27. mars 2026:**
Málið verður ikki sett á skrá til henda fundin.

**Til kunningar**

## 3/26
## 26/00001-1 Kunning um skattainntøkur 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.01.2026 | 2/26 |
| 2 Býráðið | 29.01.2026 | 1/26 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.02.2026 | 3/26 |
| 4 Býráðið | 27.02.2026 | 2/26 |
| 5 Fíggjarnevndin | 10.03.2026 | 4/26 |
| 6 Býráðið | 27.03.2026 | 3/26 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 06.01.2026**

### skattaintøkur (kunning)

**Endamál:** At kunna býráðið um gongdina í skattaintøkum hjá kommununi higartil í ár, sum kann samanberast við fíggjarætlan, og meta stutt um væntaðu gongdina fyri restina av árinum.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og býráðnum til kunning og støðutakan.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2026:**
Málið vart umrøtt og kunnað

**Býráðið 29. januar 2026:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Fíggjarnevndin 19. februar 2026:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 26. februar 2026:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Fíggjarnevndin 10. marts 2026:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 27. mars 2026:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**4/26**
**24/00159-1 Oyggjaleikir 2027 - bjóða Tvøroyri fram til at hýsa ítróttargreinum**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 4 Mentanarnevndin | 11.02.2025 | 4/25 |
| 5 Mentanarnevndin | 11.03.2026 | 26/26 |
| 6 Býráðið | 27.03.2026 | 4/26 |

**Málslýsing:**
Oyggjaleikir 2027 verða í Føroyum.

“Við fleiri enn 3.000 íðkarum, umframt hjálparfólkum og áskoðarum, eru Oyggjaleikir nógv tað størsta einstaka ítróttarliga tiltak í Føroyum nakrantíð. At vera vertir fyri Oyggjaleikunum hevur fyrst og fremst stóran týdning ítróttarliga, men eisini fyri okkara ferðavinnu og fyri Føroyar sum land” - løgmaður

Seinastu Oyggjaleikir vóru í summar á Guernsey. Kappast bleiv í 14 ítróttagreinum. Fleiri enn 2.500 luttkarar frá 24 oyggjum luttóku á Leikunum.
Komandi Oyggjaleikir verða í Orkney í 2025. Eftir Oyggjaleikirnar í Føroyum í 2027, verða Isle of Man vertir í 2029.
Fleiri upplýsingar kunnu fáast umvegis Petur Mittún, aðalskrivara í ÍSF, á fartelefon 218284.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
??

**Tilmælið:**
Skotið verður upp at senda áheitan til oyggjaleika-nevndina um, at bjóða Tvøroyri fram til at hýsa ítróttargreinum í 2027

**Mentanarnevndin 22. maj 2024:**
Einmælt samtykt at Tvøroyrar Kommuna bjoðar seg fram til hýsa ítróttargreinir í sambandi við oyggjaleikirnir í 2027. Kommunan sendir eina formella áheitan til oyggjaleika-nevndina og ISF hesum viðv., og bjóðar teimum suður at kunna seg um umstøðurnar.

**Býráðið 06. juni 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá mentanarnevndini, at Tvøroyrar Kommuna bjoðar seg fram til hýsa ítróttargreinir í sambandi við oyggjaleikirnir í 2027. Kommunan sendir eina formella áheitan til oyggjaleikanevndina og ÍSF hesum viðv., og bjóðar teimum suður at kunna seg um góðu umstøðurnar í Tvøroyrar kommunu at skipa fyri ítrótti.

**Kommunustjórin 21.06.2024:**
Tvøroyrar kommunu hevði boði ÍSF forsetanum Elin Heðinsdóttir, Petur Mittún aðalskrivara í ÍSF, John Kjær, serligur ráðgevi hjá oyggjaleikanevndini, og Solby Christiansdóttir, Oyggjaleikasamskipara, suður á fund 20. juni 2024, fyri at nevndin kann fáa eina ábending av, hvørjar karmar Tvøroyrar kommuna hevur at bjóða.

Niðurstøðan av fundinum var, *-hvat ÍSF forsetin og forkv. í Oyggjaleikanevndini [OYLN] ynskti at slá fast-,* at Suðuroyggin er partur av OYL2027, Tær søgdu seg vera hørmar um, at suðuroyingar kendi seg verða tilsíðissettir, tí tað var als ikki meiningin. Tvørur ímóti, eru ætlanin og ynskið hjá ÍSF og OYLN, at allar Føroyar eru við í OYL2027.

Upplýst var *-av ÍSF og OYLN-*, at ÍSF og OYLN skuldi venda aftur til Tvøroyrar kommunu, eftir at fyrireikandi fundur hava verði verði í IIGAG "  International Island Games Association". Tí ikki fyrr enn hesir fundir hava verði, er greitt, hvørjir leikir verða á OYL2027. Og nústani tá, kann OYLN veruligar byrja uppá fyrireikingarnar, har í m.a., hvønn leiklut Suðuroyggin kann átaka sær til OYL2027.

**Vágs Kommuna:**
Borgarstjórin í Vágs kommunu *-ið sama dag hevur havt vitjan av ÍSF og OYLN-* hevur eftirfylgjandi sent teldupost til borgarstjóran á Tvøroyri, við ynskið um, at kommunurnar samstarv um at fáa onkrar av leikunum til Suðuroynna.

**Mentanarnevndin 26. juni 2024:**
Mentanarnevndin gleðist um, at Oyggjaleikannevndin var og vitjaði í Tvøroyrar kommunu, og er okkara vón og ynski, at tað eydnast at hýsa onkra av ítróttargreinunum í kommununi, og er Tvøroyrar kommuna altíð opin fyri samstarvi.

**Kommunustjórin 14. Januar 2025:**
FSF hevur fráboðað, at tá ið Betri Oyggjaleikir 2027 verða í Føroyum, verða kappingar um alt landið.

Kappast verður í badminton, borðtennis, frælsum ítrótti, judo, kurvabólti, skjóting, súkkling, svimjing og tennis í Havn og nær við Havnina. Kappast verður í bogaskjóting í Miðvági, í fimleiki í Runavík og í flogbólti og triatlon í Klaksvík.

Harafturat verður nógvur **fótbóltur á leikunum, og avgjørt er, at fótbóltur verður í Suðuroy,** Havn og í meginøkinum annars. Enn hevur FSF tó ikki endaliga gjørt av, hvørjir vøllir skulu brúkast.

Oyggjaleikanevndin 27 fegnast um at vera komin á mál við hesi truplu uppgávu, eins og nevndin eisini fegnast um, at leikirnir eru staðsettir kring landið.

Betri Oyggjaleikir verða í Føroyum í døgunum 3.-9. juli 2027, og kappast verður í 14 ítróttagreinum.

Mælt verður til at Tvøroyrar kommuna fyrireikar seg til at kunna taka ímóti Oyggjaleikafótbólti og at kommunan fremur tey átøk, ið eru neyðug fyri at kunna fyriskipa kappingar við Stórá.

**Mentanarnevndin 2025-2028 11. februar 2025:**
Einmælt samtykt at at takka FSF fyri avgerðina um at Oyggjaleikafótbóltur verður á skrá í Suðuroynni, við áheitan um, at Tvøroyrar kommuna og Tvøroyrar Bóltfelag er klár til at taka ímóti kappingum við Stórá.

**Mentanarnevndin 11. marts 2026:**
Kommunustjórin kunnar um, at Oyggjaleikasamskipanarnevndin kemur til Suðuroynna 8. apríl, at greiða frá ymsisk viðurskiftir viðvíkjandi leikunum. -kunningin er tikin til eftirtektar.

**Býráðið 27. mars 2026:**
Málið var umrøtt og kunnað.

Fundurin lokin kl. 19:00

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Alvi Mortensen

Barbara Michalina Tausen

Bjarni Hammer

Eyð Jóna Eidesgaard

Arnfinn Bech